e-mail: jakup@sosialurin.fo
# Ítróttur
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:
www.sosialurin.fo

# Óneyðuga stórt tap

*Elddópurin hjá føroyska U-16 gjørdist alt annað enn mjúkur, men tá hugt verður í bakspeglið, má ásannast, at tapið gjørdist óneyðuga stórt*



*Sum dysturin leið, komu føroyingarnir betri við í spælið, tó uttan at skapa teir heilt stóru møguleikarnar*
***Mynd: Jonhard Hammer***

Jákup Mørk

Niðursetandi røddirnar, sum ferð eftir ferð hava ført fram, at føroyar eru alt ov lítlar at standa seg í altjóða høpi, fingu kanska enn meira ferð á mánakvøldið.

Føroyska U-16 landsliðið legði nevnliga fyri í NM kappingini við at tapa við tennistølum móti Danmark, men hóast úrslitið sum so ikki varð nakað at reypa av, so eru tó fleiri sjónarhorn, sum dysturin kann síggjast frá.

### Gevur royndir og áræði

Tað, sum helst ehvur verið ført fram flestar ferðirnar, og sum helst eisini er týdningarmesta argumentið fyri at hava føroyska umboðan í slíkum kappingum, er, at slíkir dystir geva royndir. Royndir, sum í framtíðini kunnu gerast ein sera týdningarmikil barlast hjá leikarunum at hava, tá teir einaferð í framtíðini møguliga skulu umboða land ella felag í altjóða høpi.

Harumframt skal leggjast afturat, at altjóða luttøkan er ein gularót av teimum heilt stóru hjá ungu leikarunum. Teir leggja meira í venjingina av hesum, og saman við royndunum átti hetta eisini at borga fyri eini betraðari góðsku í framtíðini.

At føroyingar ongantíð fara at gera seg rættuliga galdandi í altjóða høpi, soleiðis at heiðursmerki og annað vera at hóma, man vera teimm flestu greitt, og tí eiga vit heldur ikki at seta nøsina upp eftir slíkum.

Heims gitni venjarin hjá Arsenal, Arsene Wenger, hevur eisini júst í hesum døgum sagt sína hugsan um, hví fraklendingar eru somikið sterkir á fótbóltsøkinum í løtuni. Hann legði í tí sambandi áherslu á, at tað als ikki er av tilvild, at fraklendingar í løtuni hava eitt somikið sterkt ættarlið av fótbóltsleikarunum, men at hetta er úrslit av miðvísa ungdómsarbeiðinum, sum franska fótbóltssambandið hevur framt seinastu mongu árini. Wenger fór enn tá somikið langt, at hann segði onnur land vera eini 10 ár aftanfyri Frakland í so máta.

### Væntandi skjótleiki

Tað hevur verið sagt ferð eftir ferð, og tað verður helst eisini endurtikið fleiri ferð í framtíðini. Størsti veikleikin hjá føroyskum leikarum, tá hesir skulu royna seg í altjóða høpi, er munurin í kropsligari styrki.

Hetta gjørdist eisini heilt tíðliga sjónligt í dystinum móti Danmark, har føroyska verjan hevði sera ilt við at halda kviku áleyparunum hjá dønum. Trýstið fyrstu løtuna var eisini heilt stórt, men so við og við fótaðu føroysku leikararnir sær. Teir tordu nú betri at flyta bóltin sínámillum, og hóast talan í fyrra hálvleiki ikki var um ein einasta málmøguleika, so sá tað slettis ikki so galið út.

Teir kundu tó ikki gera nakað fyri at forða dønum at skora, og hóast leiðslumálið hjá dønum var heldur bíligt, so mundi 2-0 leiðslan í hálvleikinum vera á eini góðari leið.

Í seinna hálvleiki var søgan so at siga hin sama, men móti endanum av dystinum gjørdust málini heldur nógv í tali. Aftur her kom til sjóndar munurin í kropsligu styrkini. Føroysku leikararnir vóru snøgt sagt pøstir, og tá danir framhaldandi royndu at seta ferð á, so skrædnaði fullkomuliga hjá føroyska liðnum at enda.

Føroyar høvdu ein góðan møguleika at skora, tá tvørámaðurin, Rasmus Nolsøe, brádliga fekk bóltin eftir hornasparksstøðu, men tíverri tók skotið skeivu megin stólpan.

Munurin í skjótleika og orku at flyta seg viðførdi annars, at føroyska spælið tóktist nógv meira stirvið enn hjá dønum. Taktist vóru føroysku leikararnir als ikki so nógv verri fyri enn mótstøðuliðið, og hjá teimum flestu var munurin í bóltførleika heldur ikki so stórur, sum hann ofta hevur verið áður.



*Millum hinar dystirnar mánadagin var uppgerðin millum Finnland og Ongland. Bretar vunnu dystin 2-1*
***Mynd: Jonhard Hammer***

### Øgilig ferð

Tað tænir eisinii føroysku leikarunum til rós, at teir leingi megnaðu at taka ferðina av spælinum hjá dønum. Av øðrum dystum, sum vóru í Gundadali í gjár sást, at leikferðin í fleiri teirra var so nógv hægri enn í dystinum hjá føroyingum.

Serliga stuttligt var at síggja norsku og skotsku dreingirnar royna seg í einum dysti, sum alla tíðina varð leiktur við nógvari ferð. Einki er at ivast í, at eisini donsku dreingirnir eru førir fyri at spæla við slíkari ferð, og tí er bara at vóna, at føroyingar eru eins dugnaligir í hesum partinum av spælinum komandi dystirnar.

Í gjár, eftir at blaðið fór til prentingar, skuldu føroyingar royna seg móti Finnlandi, og hósdagin verða tað so ungu ensku leyvurnar, sum verða uppgávan hjá føryingum.

### Talvan og hátalararnir

Eitt, sum fleiri fólk tóktust fýlast á uppi í Gundadali mánadain, vóru miðlarnir, sum nýttir at boða áskoðarunum frá ymsum hendingum..

Talvan er kanska ikki heilt ung longur, men onkursvegna átti okkurt at verið gjørt, soleiðis at skil fekst á hana. Hetta hevur verið ein trupulleiki í meira enn eitt ár, og flestu áskoðararnir, sum leggja leiðina í Gundadal, munnu undrast á, at tað ikki skal bera til at fáa hana rættlag.

Hinvegin er einki sum helst galið við hátalarunum, sum hanga í teimum báðum áskoðaraskýlunum, men hesir verða kanska nýttir í meira lagi.

Í øllum førum man tað ikki vera serliga stutligt hjá hvørki leikarum ella áskoðarum at hoyra slagsangin frá nú lidna EM-endaspælinum, tá mál verða skotin til 5- og 6-0.

**Úrslit, U-16 NM**

**Bólkur A:**

**Finnland-England**
1-2 (0-1)
0-1: Mark Peers
0-2: Ben Harding
1-2: Antti Hynynku

**Føroyar-Danmark**
0-6 (0-2)
0-1: Mads Timm
0-2: Mads Beierholm
0-3: Rune R. Lind
0-4: Jeppe Curth
0-5: Mads Timm
0-6: Rune R. Lind

**Bólkur B:**

**Ísland-Svøríki**
1-3 (0-3)
0-1: Martin Fribrock
0-2: Alexander Farnerud
0-3: Mikael Bjarsmur
1-3: Kristian M. Guðjónsson

**Skotland-Noreg**
1-1 (0-0)

1-0: Martin Brady
1-1: Eirik Markergaard



# Grasið á Tórsvølli trívist væl

*Formaðurin á Tórsvølli, Poul Michelsen, ber ongan ótta fyri, at vøllurin verður ov nógv nýttur komandi vikurnar*



*Hóast drúgva turkin tykist Tórsvøllur vera væl fyri, og Poul Michelsen roknar við, at hann eigur at klára eitt trýst upp á einar 15 til 20 nýtslutímar um vikuna*
***Mynd: Jonhard Hammer***

Jákup Mørk

Finaludyst í U-kappingini, Europa-cup dystir, landsdyst og hartil venjingartímar. Grasi á Tórsvølli sleppur rættuliga at royna seg komandi tíðina, og okkurt smávegis hevur verið at hoyrt um, at hetta kanska verður ov nógv hjá vøllinum.

### Tolir væl meira

Mánadagin, meðan U-landsliðini royndu seg á teimum báðum graslíkisvallunum í Gundadali, vóru menn í fer við at sláa grasið, og annars hampa um. Sum omanfyri nevnt, so hevur vøllurin nógvar uppgávur fyri framman, men hetta fekk tó ikki á nakran hátt formannin at óttast fyri heilsuni hjá vøllinum:

-Nei, tað eri eg so slettis ikki bangin fyri, heldur hann fyri, tá vit spyrja, um trýstið á vøllin ikki verður í meira lagið komandi mánaðin ella so. Hann leggur afturat, at hóast turkurin hevur gjørt, at gróðurin kanska hevur verið í minna lagi, so hevur vøllurin tað gott.

-Eg rokni við, at undir vanligum umstøðum eigur grasiði at kunna bera eina nýtslu upp á einar 15-20 tímar um vikuna í tíðarskeiðinum frá mei og nakað út í september.

Hann vísur tó í sama viðfangi á, at enn er vøllurin ikki 100% klárur: -Vanliga verður roknað við, at tað skulu ganga eini trý ár, áðrenn grasið hevur rættuliga fest seg, og vit hava eisini stroytt mold út og trumlað, fyri at fáa alt sléttari, sigur hann. Nú metir formaðurin, at vøllurin er rættuliga væl fyri, og tá komandi mánaðurin er farin um bak, verður farið í holt við at gera hann til til komandi ár.

### Framtiðar heimavøllur?

Sostatt er sambært formanninum heldur einki til hindurs fyri, at t.d. HB og B36 kunnu spæla sínar heimadystir í landskappingini á vøllinum, og Poul Michelsen leggur eisini afturat, at feløgini hava spurt seg fyri hesum viðvíkjandi.

Bæði hava tey fingið játtandi svar, og úr HB fréttist, at tey eisini hava fingið vøllin góðkendan frá FSF.

Gunnar Mohr, formaður í HB, sigur, at hetta tó ikki merkir, at komandi heimadystirnir hjá HB verða leiktir á Tórsvølli.

-Tað er meira av praktiskum ávum, soleiðis at vit hava eitt alternativ, um graslíkisvøllirnir verða nýttir til onnur endamál, sigur hann. Hóast HB sostatt ikki hevur nakrar ítøkiligar ætlanir við Tórsvølli, so vísir HB formaðurin á ongan hátt aftur, at tað kanska kann gerast aktuelt at nýta vøllin sum heimavøll, tá tað fer at stunda til Europa-cup dystir.

Júst hetta heldur Poul Michelsen eisini vera eitt frálíkt hugskot. Hann vísir á, at altjóða uppgávurnar hjá føroyingum ofta gerast enn torførari, tí leikararnir ikki eru vanir at spæla á grasi, og at einasti møguleiki at betra um hetta er við venjing og dystum á grasi. Rætti heimavøllurin hjá feløgunum væntar hann tó framhaldandi fer at vera á ovara vølli, har spælt verður framman fyri felagshúsini.

Í B36 er júst hesin spurningur sera aktuellur í løtuni, men Rahm í Króki, samskipari hjá B36, sigur, at teir, eftir at hava umrøtt spurningin, hava valt at spæla í Gundadali, eisini komandi leygardag.

*U-16 landsliðið, søgan:*

# Vóru vónbrotnir og so vunnu teir

Fyrstu ferð føroyingar spældu ein unglingalandsdyst var í august 1973. Ta ferðina talan um eitt U-18 landslið. Mótstøðuliðið á gamla vøllinum í Gundadali var Ísland, sum vann spennandi uppgerðina 2-1. Føroyskur málskjútti var Petur Andreasen, sum í mong ár var ein av álitismonnunum á KÍ liðnum. Í fyrsta minuttinum eftir steðgin javnaði hann til 1-1 við framúr langskoti, sum sat dygst undir samankomingini. Íslendingar skoraðu sigursmálið í 84. minutti.

Fyrstu ferð føroyingar royndu seg í U-16 landsdysti var 17. juli í 1976. Sum so manga aðra ferðina tey fyrstu árini, so Ísland eisini mótstøðuliðið ta ferðina. Dysturin var í Gundadali, og Føroyar vunnu 1-0. Einasta málið ta ferðina skoraði Mikkjal Danielsen upp á brotsspark í 68. minutti.

Sigurin, sum var tann fyrsti yvirhøvur móti Íslandi, kendist serliga søtur. Fótbóltsdeildin hjá FSF hevði stríðst fyri at sleppa upp í part í NM kappingini fyri U-16 landslið, sum árið frammanundan hevði verið fyriskipað á fyrsta sinni. Teir billaðu sær inn, at tað fór at eydnast at sleppa upp í part.

Johan Nielsen var venjari, og hann og dreingirnir tóku uppgávuna í sera stórum álvara. Teir høvdu fyrireikað seg hvørt vikuskifti síðani heilt tíðliga á árinum. Tí var vónbrotið stórt, tá tíðindini bórust, at Føroyar ikki fingu høvi at taka lut. Orsøkin var tann, at hini londini mettu, at mótstøðan, sum føroysku dreingirnir fóru at megna at geva, fór at verða ov lítil.

Føroysku dreingirnir spældu ein dyst. Hann var ímóti Íslandi, sum var við í NM kappingini. Tað er ikki ilt at ímynda sær, at føroysku dreingirnir vóru sera uppsettir.

Teir, sum vóru við í fyrsta U-16 landsdystinum og harvið fyrsta sigrinum á Íslandi yvirhøvur, vóru Reynhold Isaksen, GÍ - Heðin Askham, HB, Mikkjal Danielsen, MB, Jógvan Gregersen, GÍ - Finnur Hansen, HB, Albert Ellefsen, MB, Arnhold Johansen, Skáli, Páll Gregersen, GÍ, Ólavur Biskupssøð, KÍ - Helgi Olsen, HB, Hans Sørensen, TB.

Í 2. hálvlei9ki kom Birgir Hansen, HB inn fyri Hans Sørensen. Á beinkinum sótu Per Strøm, TB, Magni Dybzak, KÍ - Hans Jákup Poulsen, HB og Dánjal Jarnskor, GÍ.

Summir av hesum spælarum vóru í mong ár við í fremstu røð. T.d. kunnu vit nevna allar gøtumenningar, Heðin Askham og Helga Olsen úr HB, og so miðvingarnar báðar. Mikkjal Danielsen taldist ímillum stuðulsspælararnar á fyrsta landsliðnum hjá Páll Guðlaugsson, og Albert Ellefsen hevur gingið á odda sum ungdómsvenjari har vesturi.

Onkrir, sum høvdu góð evnir, góvust tíðliga, m.a. tí teir fóru burtur. Ein av hesum var Ólavur Biskupsstøð úr KÍ. Hann fór til Skips og spældi tískil lítið í 1. deild. Í dag er hann skipari á størsta trolaranum í flotanum. Hann eitur Næraberg.



*Mikkjal Danielsen skeyt sigursmálið, tá Føroyar í 1976 vunnu 1-0 á Íslandi. 14 ár seinni taldist hann millum stuðulsleikararnar hjá Páll Guðlaugssyni, tá Føroyar vunnu 1-0 á Eysturríki*
***Mynd úr bókini: Fótbóltslandsliðið***